**Hoyringarsvar**

Við hesum vilja niðanfyristandandi fakfeløg geva hoyringssvar til 'lógarpakkan' um nýggju eftirlønarskipanina.

Feløgini átala harðliga, at ein so umfatandi lógarpakki, ið fremur grundleggjandi broytingar í føroysku pensjónsviðurskiftunum, verður sendur til hoyringar við so stuttum skotbráði. Tað er ógjørligt hjá feløgunum at gera eina haldgóða meting av avleiðingunum av, at hesin pakkin verður samtyktur.

Feløgini sakna í allar mátar ein opnan dialog við politisku skipanina um hesar broytingar. Harumframt er tað óskiljandi fyri feløgini, at neyðugt er at skunda eina sovorðna nýskipan ígjøgnum í desember 2013, til gildiskomu longu 1. januar 2014.

Feløgini mæla tískil til, at gildiskoman verður útsett til í fyrsta lagi 1. januar 2015, og at politiska skipanin byrjar ein dialog við partarnar á arbeiðsmarknaðinum skjótast gjørligt, soleiðis at ein komandi pensjónsskipan kann fáa ta viðgerð, ið er neyðug. Alt annað er at vísa vantandi virðing fyri øllum teimum løntakarum, ið koma undir hesa nýggju skipan.

Búskapar og Løgfrøðingafelag Føroya

Magistarafelag Føroya

Føroya Verkfrøðingafelag

Føroya Byggifrøðingafelag

Yrkisfelagið Miðnám